# Bjartari vón fyri trivnað hjá ungum í útnorðri

Góðu tit øll

Tað er mær stór gleði at bjóða tykkum hjartaliga vælkomnum til Føroyar og til hendan evnisfund: Bjartari vón fyri trivnað hjá ungum í útnorðri. Ein serstøk heilsan til tulkar okkara úr Grønlandi, Íslandi og Føroyum - ið gera tað gjørlig fyri okkum at tosa á egnum móðurmáli, teimum, sum ynskja tað.

Nú vit í Útnorðurráðnum enn einaferð velja at seta ungdóm og trivnað á dagsskránna, so er tað tí, at vit øll so brennandi ynskja finna loysnir á teimum risa avbjóðingum, sum nógv ung í okkara londum hava og eru í. Vit ynskja, at børn og ungu okkara eru vónbjørt um framtíðina. At tey trúgva upp á seg sjálvan, samfelagið og framtíðina - hóast kríggj, veðurlagsbroytingar, bústaðartrot og vaksandi ójavni rúgva í sjónarringinum.

Ung í útnorðri búgva í tí lítla partinum av heiminum, sum hevur veruligt fólkaræði. Tey vaksa upp við ókeypis skúlagongd og hægri útbúgvingum, ókeypis atgongd til heilsuverk og einum rímiliga tryggum sosialum trygdarneti, og tey sleppa at brúka sítt egna mál og at dyrka sína egnu mentan. Og við persónligum frælsi at vera, sum tey eru - tó við ávísum moralskum, mentanarligum og átrúnaðarligum avmarkingum. Nógv vaksa upp við tøttum familjubondum og sterkum felagsskapum í lokalsamfeløgum.

Men lat okkum ikki yvirdríva við teirri yndissælu myndini. Tí okkara børn og ungu vaksa eisini upp í skugganum av vælferðarsamfelagnum, í einum samfelag, har snildfonin á mangan hátt hevur avloyst nærveru og prát. Í einum gerandisdegi, har ein stórur partur av lívinum fer fram á netinum - á sosialu miðlunum, sum gevur atgongd og møguleikar, men eisini ber við sær ávirkan, eitt nú ógvisligan harðskap og happing - og ein øgiligan streym av upplýsingum, har tað kann vera nærum ógjørligt at skilja millum sannleika og falstíðindi.

Í okkara ríku londum er kappingin um at vera nakað og at prógva stór. Valini kunnu vera óteljandi. Tað kann vera torført at vera ungur í smáum samfeløgum, har øll kenna øll, serliga um tú følir teg uttanfyri sonevnda normin. At samfelagið er lítið, merkir tíverri ikki altíð, at tolsemið er størri. Onkuntíð tað øvugta.

Einsemi - kenslan av at vera einsamamøll við tínum avbjóðingum í einum heimi, har "øll" á sosialu miðlunum vísa fram sítt livandi og spennandi lív - kann gerast ovurstórt og kollveltandi, sjálvt um tú ert umgird av familju og vinum.

Jú, vit eiga at vera errin av okkara vælferðarsamfelagi, men vit eiga eisini at spyrja okkum sjálvi: Hava vit, í dansinum um gullkálvin, skapt nøkur mynstur og livihættir, sum gera okkum, og okkara uppvaksandi ungu, enn meira viðbrekin? Gevur nútímans samfelagið í mongum førum ikki tann tryggleika, kensluna av sjálvvirði og dirvi, sum eru eitt so týðandi amboð til at duga lívið?

Ein stórur partur av útnorðri eru smá nærsamfeløg við stórari fjarstøðu til góð tilboð, um tey finnast. Í økjum við lítlum sólarljósi drúgvu vetrarnar, tyngja D-vitaminmangul og tunglyndi kropp og sinn. Saman við ymiskum samfelagsligum avbjóðingum og rúsmisnýtslu kann tað vera orsøk til, at ov mong ung, serliga í arktiskum økjum, velja versta møguleikan - at taka sítt egna lív - sum vit tosaðu um á ársfundinum í Ilulissat. Ímeðan orsakirnar til, at so nógv ung stríðast við angist, máttloysi, einsemi - ja, kensluni av ikki at megna gerandisdagin - eru nógvar og samansettar, so hava vit øll ábyrgd av at gera nakað við støðuna.

Hoyra og síggja vit, hvat tey ungu siga og royna at vísa okkum? Vilja vit taka tað til okkum og virka, soleiðis, at vit veruliga skapa nýggja vón og menna trivnað og vælferð hjá okkara ungu?

Í einum heimi, sum skelvur, mugu tey ungu royna at finna fótafesti. Stuðul til at bróta niður tabu og at byggja upp álit og góð tilboð og netverk hevur so ósigandi stóran týdning.

Í dag fara vit at hoyra tey ungu sjálvi seta orð á avbjóðingarnar. Vit fara at hoyra, hvussu avgerandi tað er at bjóða hjálpandi inntriv í góðari tíð. Og vit fáa vónandi fram góð amboð soleiðis, at vit sum lógarsmiðir og sum samfelag kunnu skapa karmar við stuðli og hjálp, sum veruliga gera mun.

Evnið – Bjartari vón fyri trivnað hjá ungum í útnorðri – er ein mótsetningur til myrkrið á stóra politiska pallinum, har rætturin hjá teimum sterkastu tykist at yvirtaka rættarsamfelagið. Ímynda tær at tú ert eitt ungt fólk í Grønlandi, Kalaallit Nunaat, og hoyrir ein amerikanskan forseta siga: "Vit koma og taka títt land. Tað eru vit, tað eri eg, sum skal vera harri yvir tíni framtíð. Ikki tú, ikki fólk títt, ikki land títt. Land títt er forrestin bara ein klumpur av ísi."

Tey, sum skulu ganga á odda við virðing og tign og sum áttu at verið kyndilsberar fyri fólkaræði og sannleika, eru tey, sum nú sparka súlurnar í altjóðarætti og fólkaræði. So hart, at tær rista. Tað rakar okkara trúgv upp á framtíðina, okkara kenslu av tryggleika - og okkara samleika. Vit, Útnorðurráðið, standa saman við grønlendska fólkinum. Og vit vilja stríðast fyri, at øll ung í Grønlandi - og í útnorðurlondum - ikki missa trúnna á eina góða framtíð, og trúnna uppá, at røddir teirra hava týdning, at framtíðin ER bjørt og at hon ER teirra. Tað er okkara ábyrgd at verja eldin, sum birtir vón í huga og hjørtu teirra ungu.

Í dag seta vit greitt fokus á ung í útnorðri. Eg vóni, at dagurin fer at geva okkum týðandi vitan og fakta, sum kann styrkja vilja og mátt okkara at virka í verki. Og at ung við samansettum avbjóðingum fáa uppmerksemi - tað tilfeingi og teir møguleikar, sum tey hava uppiborið.

Hjartaliga væl komin!

Bjørt Samuelsen

Løgtingsforkvinna og næstforkvinna Útnorðurráðsins

Evnisfundur hjá útnorðurráðnum, Hotel Hilton, 27.januar 2026